Skráseting Føroya

# EGIN – VÁTTAN

**um inngjald av felagskapitali í íverksetarafelagnum**

__________ **ÍVF**

Undirritaði váttar við hesum, at felagskapitalurin á __________ kr. til kurs __________ er inngoldin kontant til ÍVF __________ tann __________

Dagfesting: __________

Stovnarar:

| | |
|---|---|
| __________ | __________ |
| Navn og undirskrift hjá stovnara 1 | Navn og undirskrift hjá stovnara 2 |
| __________ | __________ |
| Navn og undirskrift hjá stovnara 3 | Navn og undirskrift hjá stovnara 4 |
| __________ | __________ |
| Navn og undirskrift hjá stovnara 5 | Navn og undirskrift hjá stovnara 6 |

*VEGLEIÐING UM*

*EGIN-váttan við stovnan av einum íverksetarafelag*

Hendan vegleiðing er um innihaldið av egin-váttanum og hevur eitt dømi um eina egin-váttan

## 1. Hvat er ein ein egin-váttan?

Ein egin-váttan er eitt skjal, sum verður brúkt til at skjalprógva, at felagskapitalurin í einum íverksetarafelag er inngoldin. Felagskapitalurin skal í seinasta lagi vera inngoldin tá íverksetarafelagið verður skrásett.

## 2. Nær kann ein ein egin-váttan brúkast?

Tað eru bert íverksetarafeløg, sum verða stovnað við einum felagskapitali á 25.000 kr. ella minni, sum kunnu prógva kapitalin við at nýta egin-váttan.
Tað er støddin á áljóðandi upphæddini, sum er avgerandi fyri, um egin-váttanin kann nýtast.

## 3. Hvat skal standa í eini egin-váttan?

Egin-váttanin skal innhalda eina váttan um at kapitalurin er til staðar.
Egin-váttanin skal undirskrivast av øllum stovnarunum av felagnum.
Dømi um egin-váttan er niðast í vegleiðingini í skjali 1. Egin-váttanin skal tillagast ítøkiligu støðuna. T.e. rættast, alt eftir um tað eru ein ella fleiri stovnarar.

## 4. Aðrir møguleikar at góðkenna kapitalin.

Um felagskapitalurin er hægri enn 25.000 kr., og tað tí ikki ber til at nýta eina egin-váttan sum prógv, skal kapitalurin skjalprógvast á annan hátt. Tað ber eisini til at skjalprógva kapitalin á annan hátt, hóast krøvini fyri at nýta egin-váttan eru lokin.

Aðrir møguligir hættir at skjalprógva kontant inngjald av kapitalinum eru:

- Bankaskjal, sum vísir at kapitalurin íroknað yvirkurs, er settur inn á konto, sum felagið undir stovnan eigur,
- Úrrit av klientkonto hjá advokati, har tað sæst at kapitalurin er bókaður í bókhaldinum hjá einum advokati uppá felagið undir stovnan,
- vátttan frá advokati um at kapitalurin er settur á bankakonto ella klientkonto hjá advokatinum, sum felagið undir stovnan eigur, ella
- vátttan frá góðkendum grannskoðara um at kapitalurin er settur á bankakonto, sum felagið undir stovnan eigur ella er til staðar sum kassapeningur.

Tað ber ikki til at skjalprógva kontant inngjald á annan hátt enn teir nevndu.